## Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Havnar Svimjifelag varð hildin **mánakvøldið 27. februar 2023 kl. 20.00** í kantinuni í Svimjihøllini í Gundadali. Skrá sambært viðtøkunum:

1. Val av fundarstjóra
2. Frásøgn nevndarinnar frá virki felagsins í farna ári
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøða til góðkenningar
4. Ásetan av limagjaldi fyri komandi ár
5. Val av nevndarlimum
6. Val av grannskoðara
7. Innkomin mál
8. Ymiskt

***Fyri nevndina møttu:*** Hjørdis Mortensen, forkvinna, Tór Arni Samuelsen, Ólavur Weihe og Rakul Arnfríð Dam.

Harafturat møttu umleið 25 aðrir luttakarar. Finnbjørg Nattestad varð skrivari.

### 1. Val av fundarstjóra

Hjørdis Mortensen, forkvinna bjóðaði vælkomin og skeyt Jon Hestoy upp sum fundarstjóri. Uppskotið samtykt.

### 2. Frásøgn nevndarinnar frá virki felagsins í farna ári.

Forkvinnan greiddi frá seinasta árinum.

*Fleiri viðmerkingar og spurningar vóru til frágreiðingina:*

Spurningar vóru, um luttøku á landsliðslegu hjá SSF. í Vági herfyri. Forkvinna greiddi frá, at ein orsøk var, at høvuðsvenjarin hjá HS, Majiek, ikki var nøgdur við venjingarleisturin fyri sínar svimjarar. Men annars vóru fleiri svimjarar á 2. liði á venjingarleguni. er eitt mál í gongd millum HS og SSF, sum eisini kann hava ávirkað avgerðina, ikki at senda svimjarar hjá 1. liði avstað. Manglandi planlegging hjá SSF ávirkar eisini avgerðina, tá hesi tiltøk ofta verða sett á skrá í síðstu løtu.

Spurt var eisini um hvør leiklutrin hjá høvðsvenjarinum er. Forkvinnan greiddi frá, at reint praktiskt ber ikki til hjá honum at fara út á skúlarnar. Men at hann hyggur eftir teimum liðunum, sum venja í Gundadali, meðan hann er har.

Eisini vóru viðmerkingar um hvat og hvørji lið høvuðsvenjarin hevur ábyrd fyri. Ein ónøgd var við støddina av 1. lið og at 2. lið bara hevði broytt navn og prís. Eitt ynski var eisini um, at

síggja í roknskapinum, hvat var samlað inn og hvat peningurin var brúktur til. Møguliga sum ein nota.

Eisini bleiv tað tikið fram, at tað er neyðugt at gera eitt árshjól/kalendara, so at foreldur í góðari tíð síggja og kunnu fyrireika seg til tey tiltøk, sum verða, serliga tey, sum kosta pengar. Her bleiv aftur nevnt, at óvissan um ætlaninar hjá SSF, og sein boð um landsliðsætlanir, ger tað ringt hjá HS at gera langtíðarætlanir.

## 3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøða til góðkenningar

Roknskapurin vísti eitt undirskot. Semja var um, at felagið neyvan kundi rekast fyri eina minni upphædd, men meiri inntøkur mugu finnast, og øll mugu hjálpa til. Tosað varð eisini um, at felagið mátti finna fleiri stuðlar.

Aðalfundurin góðkendi roknskapin.

## 4. Ásetan av limagjaldi fyri komandi ár

Aðalfundurin samtykti, at limagjaldið verður óbroytt 200.- kr.

## 5. Val av nevndarlimum

Hetta var í fyrstu atløgu nakað fløkjasligt, tí nøkur fóru frá í úrtíð v.m., men aðalfundurin valdi nýggja nevnd, sum síðani sjálv ger av, hvør situr í eitt ár, og hvør situr í tvey ár.

*Hesi fóru úr nevndini:* Dan Eliassen, Eirikur Hofgaard, Erling Eidesgaard og Hjørdis Mortensen.

*Hesi halda fram:* Rakul A. Dam, Tór Arni Samuelsen og Ólavur Weihe.

*Hesi eru nývald:* Maria C. Nielsdóttir, Rógvi Hofgaard, Bjørg Ólavsdóttir og Finnbjørg Nattestad.

Sostatt er nevndin nú:
Rakul A. Dam,
Tór Arni Samuelsen,
Ólavur Weihe
Maria C. Nielsdóttir,
Rógvi Hofgaard,
Bjørg Ólavsdóttir
og Finnbjørg Nattestad

## 6. Val av grannskoðara

Finn Jensen varð hann einmælt afturvaldur sum grannskoðari.

## 7. Innkomin mál

Eitt mál varð innkomið frá Finnbjørg Nattestad. Uppskot um lógarbroyting:

**At broyta grein 4, stk. 1:**

frá:
"*Til at stjórna felagnum velur aðalfundurin eina nevnd við 5-7 limum (...)*"

til (uppskot 1):
"*Til at stjórna felagnum velur aðalfundurin eina nevnd við 5 limum og 2 tiltakslimum (...)*"

ella til (uppskot 2):
"*Til at stjórna felagnum velur aðalfundurin eina nevnd við 5 limum (...)*"

Finnbjørg trekti uppskot 1 aftur, eftir atkvøðugreiðslu fall uppskot 2. Grein 4 verður óbroytt.

## 8. Ymiskt

Fundarstjóri gjørdi vart við, at í 2024 stendur ein 50m hylur liðugur í Gundadali. Til tað tíð má HS totalt umkalfatrast og professionaliserast, inntøkurnar mugu upp eins og limatalið – sum má upp á 500-800 limir.

Kl 21.50 takkaði fráfrandi forkvinnan fyri góðan fundarsið og lýsti aðalfundin loknan.

______________________________

Jon Hestoy, fundarstjóri